## DAGSINS MEINING

# Frá oyðimarkargongd til valdið

Landsstevna Javnaðarfloksins í vikuskiftinum bar sjálvandi dám av, at flokkurin eftir fleiri ár í oyðimørkini nú er komin aftur til valdið. Hetta er einki at undrast yvir og væl skiljandi. Tað er tí heldur ikki so løgið, at stevnan hevur eina bjartskygda tilgongd til politisku og búskaparligu trupulleikarnar. Flokkurin kom á stevnuni til ta niðurstøðu, at í fíggjarliga trongum tíðum eigur at verða raðfest soleiðis, at almennu íløgurnar í størstan mun eru arbeiðsskapandi. Tá tað snýr seg um almennu rakstrarútreiðslurnar, eigur flokkurin at raðfesta soleiðis, at almannaøkið, heilsuøkið og útbúgvingarøkið ikki verða rakt av sparingum Landsstevnan ásannar og fegnast um, at stórur og týðandi partur av valskránni hjá Javnaðarflokkinum er við í samgonguskjalinum. Samstundis heitir landsstevnan staðiliga á floksins valdu umboð um at virka fyri, at hesi mál verða framd í verki. Tað verður so avgerandi fyri lagnu Javnaðarflokksins, um hesin setningur fer at eydnast. Eydnast hann ikki, so fer alt at detta aftur á flokkin.

Landsstevnan tók undir við politikkinum á ríkisrættarliga økinum. Stevnan fegnaðist um avtaluna, sum letur Føroya fólki avgerðarrættin á ríkisrættarliga økinum og um avtaluna um víðkaðar uttanríkispolitiskar heimildir. Hetta er sera áhugavert, og kann bert merkja, at tann meira sambandsinnaði vongurin er vorðin sissaður. Hetta er ivaleyst formanninum fyri at takka, og hevur hann við hesumfingið frið við tann annars sterka sambandsvonginum í flokkinum og kann formaðurin tí nýta alla sína orku til politiska arbeiði og at leiða samgonguna. Eitt mál, sum fylti nógv, var spuringurin um fiskiloyvini. Her varð heitt á flokkin um at fremja í verki ásetingarnar í samgonguskjalinum um, at fult gjøgnumskygni verður við fiskirættindum, og at tiltøk verða sett í verk at støðga spekulatión við fiskirættindum. Einki er at ivast í, at flokkurin her hevur ein sín størsta trupulleika og er tað tí spennandi, hvussu hann klárar hendan partin av politisku útmeldingini.

Eitt mál, ið er tengt at hesum er trupulleikin við fiskinum, sum fer av landinum. Her noyðist flokkuirn at taka eitt initiativ og fekk hann eisini boð um at leggja alla orku í at forða fyri, at arbeiðspláss í fiskivinnuni á landi hvørva orsakað av, at fiskurin fer beinleiðis á útlendska marknaðin. Eisini spurningurin um at fáa góðan og vælhagreiddan fisk til lands og av landinum varð umrøddur. Her var eisini spurningurin um at fáa okkum betri flutningsmøguleikar til feskan fisk frammi. Tað verður eisini ásannað, at tað ongantíð hevur verið meiri neyðugt enn nú at stuðla uppundir vinnuspírar við at skapa góðar karmar fyri gransking, menning og nýskapan. So mikið um tað vinnuliga og statsrættarliga. Vit venda aftur til stevnuna í komandi oddagreinum eisini.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Nýggja tyrvingarplássið á Tinghúsvøllin!

**Marin Katrina Frýdal**
*valevni Tjóðveldisflokksins til kommunuvalið í Tórshavnar kommunu*



Tað fall mær fyri bróstið at lesa um ætlanirnar hjá býráðnum at heilsa nýggju kommununi heimanfyri vælkomnan uppí felagsskapin við at brúka tey til køst. Eftir mínum tykki, sigur hesin framburður ógvuliga nógv um hugburðin hjá býráðnum, bæði tá ið ræður um umhvørvismál og ikki minst um virðingina fyri teimum smærru kommununum, ið leggja saman við Tórshavnar kommunu á nýggjárinum. Harafturat haldi eg, at hetta er eitt ógvuliga keðiligt og neiligt tekin/signal at senda út við byrjan av einum samstarvi.

Í bløðunum um dagarnar hevur verið skrivað um ætlanir at finna hóskandi øki til nýtt tyrvingarpláss. Sagt varð frá, at ein kanning er gjørd, við luttøku av bæði føroyskum og útlendskum serfrøðingum, fyri at finna, hvar best hóskandi stað er at leggja nýggja tyrvingaplássið. Úrslitið av hesi kanning var, at trý hóskandi støð vórðu funnin. Øll vóru tey heimanfyri, Fossdalur, ið er norðan fyri Velbastað, við Breiðá, ið er sunnan fyri Velbastað og so Glyvursnes. Talan er um náttúruvøkur støð, sum eisini nógv havnafólk í áravís hava havt stóra gleði av at koma út í, í sínum fríløtum frá hvønndagsligum strevi.

Eg eri stórliga bangin fyri, at tá ið býráðið hevur ætlanir um at fara so langt úr miðbýnum við sínum ruski, so er tað tí, at ætlanin er at gera ein nýggjan køst, eins og tann ið var við ruskstøðina úti í Havnardali á sinni ella við tyrvingarplássið á Húsareyni, ið er hvørki meira ella minni enn ein tikkandi umhvørvisbumba. Mær tykir, at her er talan um "ude af øje, ude af sind" politikk.

Við teimum endurnýtslumøguleikum og tí tøkni, vit hava í dag, ber til at byggja tyrvingarpláss, sum eru so rein fyri umhvørvið og náttúruna, at tey nærmast kunnu liggja millum hús. Hetta er kostnaðarmikið, tað vita vit, men hetta mugu vit taka okkum ráð til, tí vit hava snøgt sagt ikki ráð til at lata vera. Okkara land er lítið, og tí skjótt at niðurbróta við dálking og aðrari óhumsku, ið ongantíð oyðist ella forferst í náttúruni. Vit mugu hjúkla og fara væl um landið, tí vónandi koma nógv, nógv ættarlið aftaná okkum, og skal teimum so sanniliga eisini verða unt at búleikast, eins og vit, í einum reinum óspiltum landi.

Tí er mítt uppskot, at nýggja tyrvingarplássið verður bygt so nær tí stóra virkseminum/vinnulívinum sum møguligt. Nei, tó ikki á Tinghúsvøllinum, sum yvirskriftin sipaði til, men tó so nær, at vit noyðast at seta harðastu krøv til útlát, frárensl v. m. At hava tyrvingarplássið so nær virkseminum/vinnulívinum sum møguligt, sparir eisini uppá koyring til og frá, ið aftur er sparing uppá orku, dálking og harafturat vegaslit.

Tjóðveldisflokkurin fer altíð at stríðast fyri at varðveita náttúruna og umhvørvið.

# Depressivt tos

**Johan Mortensen**
*Valevni hjá Tjoðveldisflokkinum til Býraðsvalið*



Ikki krevst hægri akademist prógv fyri at siggja at Fíggjarlógin hjá Landsstýrinum fyri komandi ár er órealistisk og hevur lítið samband við kommerciella veruleikan. Heldur enn eitt hall uppá slakar 200 Mio verður hallið eitt stað millum 500 og 600 Mio ! Heldur ikki fíggjarlógin hjá Tórshavnar Býrað kemur at at halda og fara inntøkurnar eisini í Høvuðsstaðnum at minka

Arbeiðsloysi er skjótt vaksandi kring landið. Bara Suðuri í Vági ganga 150 mans fyri onki og Fiskavirking vil ikki lata sítt virkið upp.

Ronal Reagan segði í røðu í Berlin um Berlinmúrin "Mr Gorbatjov, come here and tear down that wall" eg sigi "Harra Løgmaður far suður til Vágs og lat hatta virkið upp so menn kunnu vinna sær dagligt breyð!

Afturgongdin í búskapinum fer eisini at merkjast her í Høvuðsstaðnum, Tórshavnar Skipasmiða og Eimskip tosa sítt tíðuliga mál. Skal Tórshavn verða lív lagað mugu allar góðar og kreativar kreftir taka saman hendur vinnulívinum at frama. Vit verða noydd at gloyma alla vanahugsan og arbeiða saman sum frægast so at ikki kreppan verður ov lemjandi. Tað má verða framleiðsla á øllum økjum sum skal menna hetta samfelag. Havnin kann ikki bert liva av studningi og almennum lønum. Søgan vísir at bert samfeløg sum framleiða yvirliva í longdini. Væl at merkja við einum normalum, profittskapandi, privatum vinnulívi heldur enn sokallaðum almennum partafeløgum.

Ikki skulu vit falla í fátt, tað eru framvegis nógvr møgulleikar at troyta og fari eg at koma inn á nakrar seinni. Her býr gott fólk í góðum landi, høvdu vit bara ikki klandrast so illani.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Hevur løgtingið álit á einum landsstýrismanni, sum góðtekur lógarbrot?

**Vegna nevndina í Føroya Pedagogfelag**
*Jarvin Feilberg Hansen, formaður*
*Tórshavn, 24.09.2004*



**Hans Pauli Strøm landsstýrismaður tykist at góðtaka at dagstovnalógin verður brotin.**

Felag okkara hevur nú í fleiri vikur alsamt heitt á Hans Paula Strøm, landsstýrismann, um at steðga lógarbrotinum, sum býráðið á Tvøroyri framhaldandi fremur við at hava persón uttan pedagogútbúgving í starvi sum leiðari fyri frítíðarskúlan, hóast galdandi dagstovnalóg greitt ásetur, at leiðarin skal vera pedagogur.

Landstýrismaðurin tykist ikki at hava vilja ella dirvi til at loysa hetta mál, hóast talan er um mál, sum hann hevur ábyrgdina av.

**Kunnu landsstýrismenn geva kommunum tilsøgn um ávís lógarinntriv, sum "samsýning" fyri at kommunan heldur galdandi lóggávu?**

*(avrit frá fundi millum borgarstjóran, formannin og næstformannin í sosialu nevnd og Landsstýrismannin í Almanna og - og heilsumálum Hans Paula Strøm)*

*Niðurstøða frá fundi 12. september 2004 millum borgarstjóran, formannin og næstformannin í sosialu nevnd og landsstýrismannin í Almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, um setan av leiðara til frítíðarskúla á Tvøroyri*

*Í samrøðu við undirritaða í morgun greiddi landsstýrismaðurin frá, at niðurstøðan á fundinum við Tvøroyrar Býráð var, at:*

***1). Tvøroyrar Býráð beinanvegin tekur neyðug stig fyri at fáa viðurskiftini í rættlag, harí at taka starvssetanina aftur.***

***2) Landsstýrismaðurin tekur stig til at broyta §8 í dagstovnalógini, sum m.a. ásetur førleikakrøvini hjá stovnsleiðarum.***

Eg skal við hesum heita á borgarstjóran um at vátta niðurstøðuna frá fundinum, og faksa váttanina til Almanna- og heilsmálaráðið skjótast gjørligt

Vinarliga
Aibritt á Plógv
Aðalstjóri

Vit hava, sum hjálagda avrit vísir, staðfest, at landsstýrismaðurin hevur givið Tvøroyrar kommunu tilsøgn um at hann skal taka stig til at broyta galdandi lóggávu, afturfyri at kommunan heldur hesa somu lóg.

Vit halda tað vera løgið, at ein landsstýrismaður soleiðis forhandlar við kommunur fyri at fáa tær at halda eina lóg, og enn løgnari halda vit tað vera, at hvørki løgmaður ella nakar av samgonguflokkunum hevur tala at hesari handfaring av málinum.

Heilt óskiljandi er handfaringin, tá vit kunnu staðfesta, at landsstýrismaðurin einki tykist at gera, nú kommunan heldur fram við lógarbroti sínum.

**Hevur landsstýrismaðurin hildið skyldur sínar sambært lógina um ábyrgd landsstýrisins ?**
Sum kunnugt er áset í lógini um ábyrgd landsstýrisins, at ***Løgmaður og landsstýrismenn hava ábyrgd av fyrisitingini av teim málsøkjum, sum løgd eru til teirra (grein 2).***

Fyri okkum er eingin ivi um, at ein landsstýrismaður, sum ikki handhevar galdandi lóggávu innan málsøki, har hann beinleiðis hevur fingið eftirlitsmyndugleika, hann heldur ikki skyldur sínar sum landsstýrismaður.

Enn meira greitt er hetta, tá vit svart uppá hvítt kunnu síggja, at landsstýrismaðurin við almanna- og heilsumálum ger avtalu við eina kommunu sum greitt brýtur lógina, um at landsstýrismaðurin skal broyta lógina um kommunan steðgar við lógarbroti sínum.

**Kann Føroya Løgting hava álit á einum landsstýrismanni, sum ikki steðgar lógarbroti.**
Vit fáa okkum illa at trúgva, at Føroya Løgting kann sita hendur í favn og hyggja at, meðan ein landsstýrismaður ikki heldur skyldu sína og steðgar greiðum lógarbroti.

Her kunnu vit spyrja, hvar er andstøðan ? Hví hevur eingin fólkavaldur politikkari verið frammi og átala at landsstýrismaður ikki tykist vilja steðga greiðum lógarbroti ?

**Hvar eru fjølmiðlarnir ?**
Hóast talan er um eitt rættuliga álvarsligt mál, so tykjast fjølmiðlarnir at geva málinum sera lítlan ans, og hetta halda vit vera spell, tí júst fjølmiðlarnir áttu at kent tað sum sína skyldu at víst á mál sum hetta, har landsins myndugleikar ikki tykjast at virða landsins lógir.

**Rættartrygdin í vanda**
Um verandi samgonga framhaldandi fer at góðtaka, at landsstýrisumboð teirra so skilliga góðtaka, at galdandi lógir ikki verða fylgdar, so er rættartrygdin veruliga í vanda.

Tað er tí hugstoytt, at løgmaður ikki hevur virt okkum svar, hóast vit skrivliga hava spurt hann um hann góðtekur handfaringina hjá Hans Paula Strøm, lansstýrismanni av málinum um leiðaran fyri frítíðarskúlan á Tvøroyri.

Hendan tøgn løgmans reisir illgruna um, at fyri løgmann er tað meira umráðandi, at royna at verja floksfelaga sín enn at hava eftirlit við, at landsstýrismaðurin røkir skyldur sínar.

# Tjóðveldisflokkurin vil hava borgarstjóran

**Hildur Eyðunsdóttir**



Tjóðveldispolitikkur er eisini býráðspolitikkur, og sjáldan hevur tað verið so týdningarmikið, at fáa ein sterkan Tjóðveldisflokk í býráðið, sum til hetta valið. Í Tjóðveldisflokkinum vilja vit gera Tórshavnar kommunu til eina fyrimyndarliga vælrikna og góða kommunu hjá øllum at búgva í.

**Rættartrygdin í hásæti**
Tað liggja stórar uppgávur fyri framman, ikki minst at endurreisa álitið á kommununa. Og komandi valskeið vil Tjóðveldisflokkurin leggja alla neyðuga orku í, at kommunala fyrisitingin kemur at virka í trá við bæði fyrisitingarlóg, og lógina um alment innlit.

Mong síggja hesar lógir sum eitt haft um beinini og sum eina forðan fyri effektivari arbeiðsgongd. Men veruleikin er tann, at hesar lógir skulu tryggja okkum, at alt fer rætt fram, so at fyrisitingarligar avgerðir ikki vera tiknar á skeivum grundarlagið til skaða fyri borgaran.

Tórshavnar kommuna hevur sum elsta og største kommuna í landinum, ígjøgnum langa tíð bygt sínar egnu mannagongdir og umsitingarligu siðvenjur upp, men eru tær mangan als ikki í trá við, hvørki fyrisitingarlóg, ella lógina um alment innlit, har rættartrygdin er í hásæti. At broyta hetta, krevur eitt miðvíst arbeiði, og neyðugt er at styrkja fyrisitingina, og at gera hetta við virðing fyri kommunalu starvsfólkunum.

**Opinleiki og nærdemokrati**
At vit yvirhøvur hava kommunur er tí, at vit ynskja at fólkaræði skal vera so nær borgaranum sum gjørligt, og tí hava vit valt, at tær uppgávur sum beinleiðis viðvíkja borgaranum skulu loysast og røkjast í kommununum. Men fyri at uppfylla hugsjónina um nærdemokrati, so krevur tað, at kommunan, í nógv størri mun, tekur borgaran við uppá ráð.

Kommunan skal tí, í góðari tíð, kunna um hvørjar uppgávur og ætlanir liggja fyri framman, og yvirhøvur gera tað lætt hjá fólki, at seta seg inn í mál ið hava teirra áhuga, soleiðis, at øll, ið hava hug til tess, hava møguleika at luttaka og ávirka.

**Trivnaðarpolitikkur**
Ein kommuna fyri øll. Tað er í stuttum trivnaðarpolitikkur Tjóðveldisfloksins. Tað skal vera rúm fyri øllum og tilboð til øll. Trivnaður er ein hugsjón, og ein tilgongd. Alt okkara politiska virksemi eigur at vera ein leið fram móti størri trivnað, og vit vilja í Tjóðveldisflokkinum arbeiða fyri, at fáa trivnaðarhugsjónina inn í allar tættir í kommunalum arbeiði.

**Tjóðveldið í býráðspolitikki**
Rættartrygd, fólkaræði, opinleiki og trivnaður. Hesi hugtøk, sum eru hornasteinar undir einum góðum samfelag, vera í stóran mun fyrisitin í kommununum. Tí er tað eisini í kommununum at vit skulu ítøkiliggera vælferðarsamfelagið, og byggja upp álit á skipanirnar og álit á okkum sjálvi. Tí er kommunupolitikkur eisini tjóðveldispolitikkur. Tí er ein sterkur Tjóðveldisflokkur alneyðugur í býráðnum. Og tí er tað neyðugt at vit koma í fremstu rók, í meiriluta og í borgarstjórasessin.

# Suðuroyggin, klandur og stríð

**Mathias Lassen**

Nú verður dúgliga skrivað um Suðuroynna, serliga eru tað politikkarar, sum siga sína hugsan. Tað er eisini vanligt, tá tað stundar til val.

Hesir politikkarar vita so ógvuliga væl, hvat rættast er, men um hesi somu fólk hugdu í bakspeglið, hugdu eftir, hvat tey hava gjørt fyri Suðuroynna í øll tey ár, sum tey hava sitið í bý- og bygdarráðum, so varð teirra úrslit sera væl lýst í Degi og Viku týskvøldið 21. sept. Sagt varð, at í 1950 búðu 20% av øllum føroyingum í Suðuroy. 20% í dag er tað sama sum 10.000 fólk, men verðuleikin er tann, at 5.000 fólk eru búsitandi í Suðuroy í dag.

Hesir politikkarar, sum sitið hava hesi seinastu 50 árini, hava stórt sæð avfólkað hesa vøkru og sermerktu oyggj. Skammið tykkum.

Eg minnist 50-ini. Hóast kreppu í øllum landinum, so var tað Suðuroyggin, sum helt longst út. Hon mátti eisini lúta til síðst, og øll virkini fóru á heysin, eitt fyri og annað eftir, men tað var fleiri ár eftir at Sjóvinnubankin var farin á heysin.

Eingin fall í fátt, og skjótt tóku menn og kvinnur seg saman, og settu gongd í aftur virksemið. Tað var tann positivi andin í fólkinum sum dreiv verkið. Tað stríð sum tá var millum bygdirnar, tað varð ornað sunnudag á plenuni.

Men so fóru politikkarar at stríðast og berjast, og tað hevur niðurbrotið allan tamm positiva andan sum var í fólkinum.

Hugsið tykkum eitt húski við fleiri børnum. Um pápin og mamman alla tíðina hava ein negativan holdning, so vaksa børnini upp í einum negativum anda og í slíkum føri spyrst einki burtur úr. Og soleiðis uppliva vit kommunustýrislimirnar í dag, tað er ein negativur andi innan bý- og bygdarráðsgátt, og í tí anda vaksa vit (borgararnir) upp í. Tað kann ikki spyrjast nakað gott burtur úr.

Nú hesi fólk skriva í bløðunum, er tað helst fyri at verða vald inn í bý- og bygdarráð, men eg vil inniliga heita á tykkum, um at taka tykkum saman og finna eina positiva gongda leið og leggið svørðini frá tykkum, tað er eitt krav frá okkum borgarum. Lat hetta val snúgva seg um at standa saman sum ein maður.

Kunnu tit ikki tað, so biði eg tykkum so inniliga um, at tit ikki lata tykkum stilla upp til hetta kommunuval. Vit vilja hava, at fólkið stendur saman sum ein maður, líka úr Sandvík til Sumbiar.

Hugsið tykkum til, at í dag kundi 10.000 fólk búð í Suðuroy, um tit høvdu handlað rætt. Takið tykkum saman, vælsignaðir menn og kvinnur.